# Fýra persónar og

## Hvør býr hvar?

Fýra kendir føroyingar úr ymiskum tættum í samfelagnum – ein ítróttarmaður, ein politikkari, ein stjóri og eitt listafólk vísa okkum stovur sínar.
Vita og gita, hvør býr hvar? Ikki lúra á næstu síðu, har tú fært svarið.

**Tekst:** Inna Tørnroos
**Myndir:** Jens Kristian Vang og Álvur Haraldsen



### Vinnulív
**Laila Hentze, stjórið Televarpið**

Laila Hentze er 33 ár og stjóri á Televarpinum. Hon og maðurin Jóan Petur keyptu húsini fyri einum ári síðani og hava búð har síðani.

– Vit hava ikki gjørt nógv við húsini, bara málað.

Húsini eru bygd í 70'unum og eru 270 fermetrar til víddar.

Stovumøblarnir eru ein blanding av nýggjum og gomlum. Møblarnir, tey hava keypt nýggjar, eru tíðarleysir, heldur Laila.





### Mentan
**Astrid Andreasen, listakvinna**

Astrid Andreasen arbeiðir á Náttúrugripasavninum og sum listakvinna. Hon býr í einum 110 ára gomlum húsum saman við manninum og soninum David. Tey hava búð í húsinum síðani 1989. Húsini eru 180 fermetrar. Astrid sigur sjálv, at hon hevur samlaramani, so nógv av tí, sum er í stovuni, er tílíkt, sum hon samlar uppá. Møblar og annað hava hon og maðurin keypt fyri lítið og lætt á ferðum kring knøttin.

– Nógv av stovuni er inspirerað av djórum, sigur Astrid.

